# Tiltøk

**Aftankvirra verður í Havnar kirkju**
Fríggjakvøldið 1. okt. kl. 21-23. Kl. 22 syngur kórið Cantabile. Kl. 22.30 andakt við Sonju Klein, presti.

**Matiné í Havnar kirkju í sambandi við eldradagin**
Fríggjadagin 1. okt. kl. 14.35
Lysets engel går med glans, CEF Weyse/B.S. Ingemann. Nú skínur sólin bjarta, CEF Weyse/Símun av Skarði. Per la gloria, Italiensk antik aria. Panis Angelicus, Cécar Franck – bíbilskur tekstur. Cast your shade, Jean-Baptiste Lully, Herbslied Mendelsohn. Ich, wollt' meine lieb' ergösse sich, Mendelsohn. Dagur seinkar, setir sól, gl.før.lag (satsur K. Clausen)/J. Dahl týddi. **Henning Bøgesvang, prestur, sigur nøkur orð.** Sov blítt og søtt, danskt lag (satsur K. Clausen) / H.A.Djurhuus týddi. **Luttakarar:** Joanna Johansen, sangur. Gunnvør Poulsen, sangur. Bjarni Restorff, fylgispæl.

**Fríggjadagin 1. okt.**
Christianskirkjan kl. 15 verður hugnaløta í kirkjukjallarnum har Ólavur í Mittuni greiðir frá síni tíð í Føroyinga havnini.

**Gudstænastur 3. okt.**
**Havnar kirkja:** kl.11 altargangur, skrm.kl.10.40, Uni Næs, dómpróstur
**Hoyvíkar kirkja:** kl. 11 Niels Pauli Danielsen. Sunnudagsskúli er undir gudstænastuni
**Vesturkirkjan:** kl. 11 Bergur Debes Joensen. Konfirmatión. Sunnudagsskúli er undir gudstænastuni
**Argja kirkja:** kl. 11 Derhard Jógvansson. Sunnudagsskúli er undir gudstænastuni
**Nólsoyar kirkja:** kl. 12 Sonja Klein
**Hests kirkja:** kl. 12 Heri Joensen
**Fuglafirði:** kl. 11 Sverri Steinhólm, altarg.
**Hoyvík:** kl. 11 Niels Pauli Danielsen
**Fríðrikskirkjan:** kl. 11 Martin R. Jacobsen, konfirmatión
**Hvalba:** kl. 12.30 Bjarni Bæk
**Miðvágur:** kl. 11 Inga Poulsen Dam, konfirmatión
**Øravík:** kl. 11 Jónsvein Bech, konfirmatión
**Hósvíkar kirkja:** kl. 11 Henning Bøgesvang, v/ barnadópi
**Hvalvíkar kirkja:** kl. 12 Henning Bøgesvang (konfirmantar frá 1960 eru við)
**Christianskirkjan:** kl. 11 Lestur
**Húsar:** kl. 11 Hanus á Gørðum
**Mikladalur í skúlanum:** kl. 12.15 Hanus á Gørðum, altarg.
**Sjóvar kirkja:** kl. 12 Símun P Jacobsen
**Vestmanna:** kl. 11 Jógvan Fríðriksson, biskupur, altarg.
**Gásadalur:** kl. 11 David Johannesen, altarg.
**Glyvra kirkja:** kl. 11 Meinhard Bjartalíð. Sunnudagsskúli er undir gudst., Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan.
**Broytt kirkjutíð í Norðskála:** Frá komandi sunnudegi verður farið í kirkju við Norðskála kl. 12
**Porkeri:** kl. 12 Patrick de Neergaard
**Vágs ældrebolig:** kl. 14 Patrick de Neergaard
**Fuglafjarðar kirkja:** kl. 11 Sverri Steinhólm, altarg. Talvan gongur fyri Bláa Kross í Føroyum
**Sandur:** kl. 12 Jákup R. Hansen

**Sjómanskvinnuringurin í Havn**
Vit koma saman mikukvøldið kl. 19.30 í Meinigheitshúsinum. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoman**
Møti verður sunnukvøld kl. 18. Øll eru vælkomin.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17 messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 hámessa v/Mikolaj Kecik, prestur í Mariukirkjuni. Aftaná á messuna verður ein drekkamunn. Sunnudagsskúli kl. 14.
www.katolsk.fo

**4 Grein skótar**
Vit hittast í K.F.U.K. mánadagin kl. 17.30 (Chistmas Child fo)

**Lívdin í Skúlanum við Løgmannabreyt**
Leygarkvøldið Alive kl. 21. Tiltak fyri ung. Guttorm Joensen talar. Eisini verður lovsonur og forbøn.
www.ung.livdin.fo
Sunnudagin Familju- og tilbiðjanarmøtið byrjar kl. 10.30 og lovsongur og tala kl. 12. Á familju- og tilbiðjanarmøtinum hevur Lív Clementsen eina hugleiðing. Á seinna møtinum kl. 12, talar Høgni Johannesen um "Er bíblian álítandi?" Sunnudagsskúli, unglív og barnaansing er meðan seinna møti er kl. 12. Hjartaliga vælkomin.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. Kl. 11 Fráfaringargudstænasta, Jens V. Danielsen/Allan Falk. Felagsmáltíð.

**Frelsunarherurin Tórsgøta 19, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti. kl. 11 Sunnudagsskúli. Kl. 18 møti í Misjónshúsinum í Kollafirði. NB: Møti verður ikki í Frelsunarherinum kl. 18, men øll eru vælkomin í Misjónshúsið í Kollafirði.

**Missiónshúsinum við Landavegin**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/Sigurd Syderbø.

**Samkoman Immanuel, Brekkutún 5, Hoyvík**
Fríggjakvøldið kl. 19 Kongsins Herlið, møti fyri børn frá 8 ár og uppeftir. Øll verða koyrd heim eftir møtið. Kl. 21 Herur Jákups, ungdómsmøti. Verið hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 11.30 Barnakórið venur. Kl. 12 Møti v/sunnudagsskúla. Barnanasing er undir møtinum fyri børn undir skúlaaldur. Verið hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia Tórshavn**
Fríggjadagin kl. 07.15 Morgunbøn. kl. 20 Mammur hittast til bøn.
Leygarkvøldið kl. 21 Flare
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, Tummas Jacobsen talar Kl. 13.15 SundagsKool
www.filadelfia.fo

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Barnaansing er meðan møti er. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangelisktmøti. Barnaansing er meðan møti er.
www.ebenezer.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 Familju- og morgunmøtið við sunnudagsskúla, Henrik Mellemgaard talar.
www.gospel.fo

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti v/ Senior Kamboditoymi greiðir fra túrinum. Øll eru hjartaliga vælkomin

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadag 4. okt. kl. 15 í KFUK: Seinnapartsamkoman við Sólbjørg Símunarson. Evni: Sálmar
Týsdag 5. okt. kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn og juniorar.
Mikudag 6. okt. kl. 19 í KFUM: Ten-sing kórið venur.
Hósdag 7. okt. kl. 19.30 í KFUK: Hugnakvøld, vit pakka skógvaeskir til børn úti í heimi.

**Argir, Kirkju- og missiónshúsið**
Sunnukvøldið kl. 18 Sangmøti

**Gongutúrur**
Sunnudagin verður gongutúrur á Sornfelli. Farið verður frá Kunningarstovuni kl. 10. Túrurin er tungur og brattur. Havið heit og góð gongukklæði, ein heitan munn og matpakka við. Tilmelding á Kunningarstovuni, á tlf. 302425 / torsinfo@torshavn.fo

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia Vágar**
Sunnudagin kl. 11 Møti. Kl. 11.30 sunnudagsskúli. Øll eru hjartaliga vælkomin

**Kvívík**
Sunnukvøldið kl. 18 verður møti í Glæmuni í Kvívík við Elisabeth Leo o. ø. úr Skopun. Húsakórið úr Vestmanna syngur. Øll eru vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14 verður sunnudagsskúli og kl. 18 verður møti við Frelsunarherðinum.
Týskvøldið verður bønarløta kl. 19.30 og bíbiltími kl. 20 v/ Jógvan Højgaard. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hjúnabandsskeið við Steen Palmqvist**
Fríggjadagin 15. okt. og leygardagin 16. okt., hevur Steen Palmqvist hjúnabandsskeið í Kelduni í Skálafirði. Kostnaðurin er 200,- kr. fyri hvønn íroknað døgurða og drekka. Tilmelding á tlf. 742054, 581512 og á telduposti tvorfoss@kallnet.fo
Sí annars á www.keldan.fo

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjakvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudag kl. 17 Felagsmøti Elsa Lervik Søndergaard talar, kórið luttekur. Innsavning til húsið og kaffi. Um tær manglar fart, so ring á tlf. 447090 ella 775091.

**Keldan, Skálafirði**
Samkomulegan byrjar fríggjakvøldið kl. 18.
Sunnudagin kl. 11 Familjumøti.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Meinigheitshúsið á Skála**
Fríggjakvøldið kl. 19 juniormøti.
Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli. Kl. 19 møti við Egil Joensen. Drekka og innsavnan til húsið.
Øll hjartaliga vælkomin

**Karmel á Eiði**
Sunnukvøldið kl. 19 møti. Talari er Atli Rasmussen

**Missiónshúsiði í Rituvík**
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti, alt kan henda.
Sunnudagin kl. 16 Familjumøti Kl. 18 Møti.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 17 Møti
*Húsmøti*
Fríggjakvøldið kl. 20 Húsmøti hjá Hargar & Marinnu Hansen, Æðuvík. Øll hjartaliga vælkomin

**Missiónshúsið á Selatrað**
Sunnukvøldið kl. 19 møti v. John S. Myllhamar

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin verður eingin sunnudagsskúli, men kl. 17 verður familjumøti.
Meiri kunning á www.leirvikar.fo
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Getsemane, Stangaskákið 1, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti
Leygarkvøldið kl. 20 Evangeliskt møti í Ósáskúlanum v/ Róa Norðoy evni: Er Guðs kærleiki fyri øll?
Sunnukvøldið kl. 18 Møti Barnamøti er samstundis
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti v/breyðbróting

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ Pauli Høj
www.solideogloria.fo

**KFUM & K í Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúlin. Kl. 17.30 Bønarløta. Kl. 18 Møti við Albin Johannessen. Steingjakórið syngur. Innsavnan til húsið. Kl. 21 Ungdómsmøti.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Vegna fermingardag verður eingin sunnudagsskúli og einki møti sunnudagin.

**Meinigshúsið í Vági**
Leygarkvøldið kl. 20 verður møti. Sunnukvøldið kl. 18 verður møti við Sigfred Johannesen og Hans Paula Højgaard. Øll eru vælkomin.

**Bethel, Vági**
Sunnudagin
Kl. 11 Breyðbróting
Kl. 12.30 Sunnudagsskúli
Kl. 18 Familjumøti. Stutt frágreiðing og filmsbrot um Christmas Child. Øll eru hjartaliga vælkomin

**Frelsunarherurin Vágur**
Fríggadagin kl. 09.30 orðið á borðið. Vikuskiftisfundir byrja við sangcafe. kl. 21. millum onnur Lutaka, Niels og Fríðbjørg, Sigmund Andreassen, Nimrod Midjord, og manskóri. Eisini hava vit vitjan av Árant Johannessen, úr Esbjerg. Øll eru vælkomin.
Leygarkvøldið kl. 20 møti við Árant Johannessen og fleiri. drekka aftaná. Øll eru vælkomin
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti/sunnudagsskúli kl. 15 sjónvarpsmøti .drekka aftaná. Øll eru vælkomin.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarløta
Týsdagin kl. 09.30 orðið á borðið kl. 20 heimaforbundið.
Mikudagin kl 14.30 barnakór.

**Mikladals skúla**
Leygardagin kl. 19 møti, Marius Jacobsen talar.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf. 316491/286491*
*Opið er mánadag – hósdag kl. 9-17 og fríggjadag 9-16*
*tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
Fríggjadagur
1. okt. er altjóða eldradagur, og verður dagurin hildin kring allan heim. Í hesum sambandi skipar Eldraráðið í Tórshavnar kommunu fyri eldradegi í Tórsgøtu í Tórshavn undir heitinum, "Virkin og vakin." Skráin: Kl. 10-10.30 Heðin Mortensen, borgarstjóri setir dagin og Mortan Rasmussen, formaður í eldraráðnum hevur orðið (parkeringsøkið).
Kl. 10.30-10.50 Rørsla í Tórsgøtu (á parkeringsøkinum).
Kl. 11-11.30 Eyðun Andreassen, fólkalívsfrøðingur, heldur fyrilestur um "vitan og makt" á Gamla Reinsarií. Kl. 11.40 – 12.10. Tjóðpallurin. Laura Joensen: Hugleiðingar um Johonnu Mariu Skylv-Hansen og brot úr leikinum "Logi, logi eldur mín."
Kl. 12.10-13.30. Døgurðasteðgur. Í miðbýnum eru frálík matstøð, og Tilhaldið í Tórsgøtu selur breyðsuppu.
Kl. 13-1630. Ellisakfør verða sýnd fram í Tórsgøtu.
Kl. 14-14.30. Ása Róin, sjúkrarøktarfrøðingur, heldur fyrilestur á Gamla Reinsarií.
Kl. 14.45-15.15. Tjóðpallurin. Laura Joensen: Hugleiðingar um Johonnu Mariu Skylv-Hansen og brot úr leikinum "Logi, logi eldur mín." Kl. 14.35-15.15 Dómkirkjan. Matiné har m.a. Henning Bøgesvang, prestur, sigur nøkur orð og Joanna Johansen syngur.
Kl. 16 Halla Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd, tekur samanum og endar dagin.
Kl. 10-16 Perlan. Café, har møguleiki er at fáa kaffi og te. Klokkan 15 verður tónleikur, har Simme skipar fyri.
Ókeypis svimjing er fyri pensionistar í svimjihøllini í Gundadali allan dagin. Fleiri upplýsingar um eldradagin fáast við at venda sær til formannin í Eldraráðnum, Mortan Rasmussen.
Mánadagin
Kl. 9 Horn- og beinarbeiði. Tilmelding: 316491, Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga.
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið. Í motiónsrúminum er rógvimaskina, kondisúkkla, renniband og krossari.
Kl. 10 Fimleikur fyri kvinnur, Greta Ellingsgaard. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Kl. 11 Enskt talumál.
Kl. 14 Kortspæl og onnur spøl. Telduskeiðini verða lýst seinri.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Blákrossbúðin Kongagøta 10, Tórshavn**
Tekur ímóti góðum klæðum, Opið er: mánadag – fríggjadag frá kl 10-12 og 14-17.30 og leygardag frá kl 11-14.
Bláí Krossur hjálpir fólki í Føroyum við rústrupuleikum.

**Blákrossbúðin Heiðavegur 32, Tórshavn**
Tekur ímóti góðum klæðum. Opið er: mánadag – fríggjadag frá kl 13-17.30 og leygardag frá kl 10-13.
Bláí Krossur hjálpir fólki í Føroyum við rústrupuleikum

**Pensionistafelagið í Havn**
*Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst. Tlf. 222733 finnurj@post.olivant.fo*
Limirnir koma saman í Losjuni Mikukvøldið 6. oktober kl. 19.

**Losjan í Havn, Tinghúsvegur 18**
Fríggjadag kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Listasavnið á Sandi**
er stongt allan okt. mðr., men letur upp aftur í nov. Frá nov. til mai er bara opið sunnudag kl. 14-16. Bólkar o.o., sum vilja gera seravtalu um aðrar tíðir kunnu ringja á tlf. 211924 ella 361617 í góðari tíð frammanundan.